# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Norsk vitjan í Frelsunarherinum

**Um hvítusunnuna verður stevna hildin í Frelsunarherinum í Havn, har m.a. majorurin Njál Djurhuus fer at tala**

Møtini byrja hvítusunnudag kl. 11 og síðani verður hildið á báðar dagarnar við talum bæði á norskum og føroyskum. Evnið fyri møtini er "Við kærleikans vápnum".

Við sær úr Noregi hevur Njál fingið vinmannin, Jørn Kristian Jørgensen, sum til dagligt er kunningarstjóri hjá løgregluni í Oslo. Hetta starvið hevur hann havt seinastu 25 árini.

Hesin Jørn Kristian hevur roynt mangt og hvat, og hevur tí nógvar royndir at kryddra talur sínar við.

Frammanundan arbeiddi hann sum blaðmaður í Noregi, USA og Sri Lanka.

Jørn hevur skrivað 14 bøkur. Millum tær kann nevnast bøkurnar "I livets manesje", "Den lengste reisen", "Te med elefanter", "De trodde på en ny dag" (um norskar løgreglupersónar í fangalegu í Týsklandi undir síðsta veraldarbardaga), "I grenseland" (um lívið hjá Nils Retterstøl sálarlækna) og "Guddommelig kvinnegnist" (um Otilie Tonning og hennara arbeiði í Frelsunarherinum).

Í 2003 ritstjórnaði og gav hann út bókina hjá Dag Hammarskjøld "Veimerker" frá 1963.

Jørgensen hevur eisini skrivað tvey bókabind av bókarøðini um lógarbrot í Noregi.

Somuleiðis hevur hann somuleiðis skrivað um 60 lívssøgur í "Norsk Biografisk Leksikon". Hann hevur í fleiri ár verið blaðstjóri í "OP-Magasinet" hjá løgregluni í Oslo.



*Jørn Kristian Jørgensen hevur roynt mangt og hvat í sínum lívi. Nú vitjar hann Frelsunarherin í Havn har hann fer at tosa um eitt áhugavert evni – Við kærleikans vápnum*

## Ein manning úr Klaksvík



**Ein lesari hevur latið okkum hesa myndina, sum hesin heldur vera av einum fótbóltsliði við klaksvíkingum. Ein annar lesari heldur hetta ístaðin vera eina skipsmanning úr Klaksvík**

Myndin er helst tikin í 1962, og er tí tikin áðrenn tiltikna 66-liðið hjá KÍ. Myndatakari er Norman F. Sinclair, sum hevði studio sítt í King Street í Kirkwall á Orknoyggjunum.

Lesarin sigur seg kenna nakrar av leikarunum, men ivast í fleiri teirra. Hon vil fegin frætta frá fólki, ið kennir hesar menninar. Tað kann gerast við at ringja á **tlf. 314678.**

Leikararnir, hon heldur seg kenna, eru hesir:

Í aftasta raði frá vinstru: 1) Bróðir Sámal Júst, 2) Luddi hjá Toda, 3) ókendur, 4) ókendur, 5) Mourits Jacobsen, 6) ókendur, 7) Steinbjørn ?, 8) Jógvan ?, 9) Gutti Kallsberg, 10) Jógvan á Høvdanum, 11) Frímann Baldvinsson, 12) Zacharis Lydersen, 13) Sámal Júst ?, 14) ókendur og 15) Álvur Klakk.

Sitandi f.v.: 1) ókendur, 2) John Reid Bjartalíð, 3) Guddi á Dalinum? og 4) Robert Joensen.

### Skipsmanning

Ein annar lesari úr Klaksvík hevur sæð hesa myndina, og kennir somuleiðis ein part av monnunum. Hann heldur, at her er talan um eina skipsmanmning. Sambært hesum lesara er manningin henda, aftast vm.: 1) Herman Dahl, 2) Ludvík Jónsson (Luddi hjá Toda), 3) Kristoffur ?, 4) ókendur, 5) Jens Hansen, 6) ókendur, 7) Steinbjørn Jacobsen, 8) Jógvan Jacobsen, 9) Gutti Kallsberg, 10) Jógvan á Høvdanum, 11) Frímann (vanliga róptur Frimann) Baldvinsson, 12) Zakarias Lydersen, 13) Sámal Júst Ziska Dahl, 14) ókendur og 15) Álvur Klakk.

Sitandi eru teir vm.: 1) ókendur, 2) John Reid Bjartalíð, 3) Poul Jacob Olsen, reiðari og Robert Joensen.

**sb.**

## Enn ein ugla á Føroyavitjan



**Á hvørjum ári koma uglur framvið Føroyum. Í vetur kom ein teirra framvið einum urtagarði á Signabø**

FUGLAFRØÐI
*Snorri Brend*

Jens Kjeld Jensen í Nólsoy er ikki í iva: Hetta er ein kattugla.

Ein lesari sendi okkum fyrr í vikuni nakrar myndir av einari uglu, sum viðkomandi hevði sæð í urtagarði sínum á Signabø.

Vit sendu myndirnar víðari til kenda fuglamannin í Nólsoy, og svarið kom beinanvegin: Hetta er ein kattugla, sum telist millum tey 10% av uglunum, ið koma fram við Føroyum.

Danska navnið fyri hesa ugluna er skovhornugle og á enskum kallast hon Long-Eared Owl.

Jens Kjeld sigur, at mest vanliga uglan, sum vitjar her á landi er uglubóndi, og síðani kemur kattuglan.

Aðrar uglur sum hendinga ferð eru at síggja í Føroyum eru snjóuglan og lítil kattugla. Hesar síggjast serliga í Føroyum um várið og heystið, men tær eru kortini rárir gestir her á landi.

### Ugler i mosen

Annars eru nógv úttrykk bundin júst at uglunavninum.

Eitt tað kendasta er danska orðafellið um at "der er ugler i mosen", sum á føroyskum hevur mong heiti, t.d.: Har ruggar ikki alt rætt; har býr okkurt undir; har er ikki alt upp á tað beina, og har er ikki rættvorðið.

Eitt annað er "fange ugler", sum í føroyskari merking er at sigla soleiðis, at seglini fara at blaktra; ikki halda ella hava áralag, ella at fáa ár tvørt fyri í sjónum.

Nevnt verður eisini "at have ugler i håret" sum merkir at vera frísutur, og annars merkir ugla eisini ein, ið hyggur at, meðan onnur spæla kort.

†

Kungjørt verður fyri ætt og kenningum
at okkara kæra kona og mamma

**Eilen Andersen**
fødd Larsen, ættað úr Sørvági

andaðist í Helsingør 9. mai, 63 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Espergærde kirkju
12. mai kl.12.30

*Familjunnar vegna*
**Finn, Niclas og Heini**